

# Tekniskur stjóri til Tórshavnar kommunu

**Ábyrgdarøki**

Saman við borgarstjóra, kommunustjóra, trivnaðarstjóra og miðfyrisitingarstjóra mannar tekniski stjórin leiðslutoymið í kommununi og kemur í samstarvi við politiska myndugleikan at raðfesta uppgávurnar og leggja til rættis kommunalu ætlanirnar.

Tekniski stjórin er ovasti leiðari fyri teknisku fyrisitingini við tilvísing til kommunustjóra og borgarstjóra. Næstu starvsfelagar eru býarverkfrøðingurin og býararkitekturin, sum er byggifulltrúi.

**Arbeiðsuppgávur**

Høvuðsuppgávan verður at stjórna og samskipa arbeiðsøkini í teknisku umsitingini og hava umsitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina um hendi.

Tekniski stjórin er sambindingarliður millum teknisku umsitingina og politisku skipanina og skal ansa eftir, at lógir, reglugerðir og samtyktir verða fylgdar.

Tekniski stjórin skal eisini tryggja, at fyrisitingin hevur gott samskifti við borgaran, viðskiftafólk og landsstovnar.

**Førleikakrøv**

Vit sóknast eftir einum stjóra við akademiskari útbúgving, sum hevur áhuga fyri og hollan fíggjarligan og fyrisitingarligan kunnleika. Arbeiðið krevur virðing fyri og fatan av politisku skipanini.

Harumframt vænta vit, at stjórin hevur leiðsluroyndir og er førur fyri at taka avgerðir. Vit vænta eisini, at hann er áhugaður í býarskipanarligum viðurskiftum, býarvarðveiting, náttúru- og umhvørvismálum og tekniska økinum sum heild. Vit leggja stóran dent á góð samstarvsevni og ein javligan hugburð.

**Lønar- og setanarviðurskifti**

Starvið er tænastumannastarv og verður lønt í 38. lønarflokki við tvey ára royndartíð.

**Umsókn**

Umsóknir saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi týsdagin 3. juli 2006 kl. 12.00. Viðmerkið umsóknina: *Tekniskur stjóri.*

Um tú ynskir at fáa meira at vita um starvið kanst tú venda tær til Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, ella Heðin Mortensen, borgarstjóra, á tlf. 30 20 10.

**Tórshavnar kommuna**

REPROZ

## Næmingur til bókhaldið

Vit leita eftir einum næmingi til bókhaldið at byrja sum skjótast.

Vit ynskja, at tú hevur miðnámsútbúgving ella viðkomandi prógv.

Og at tú:
- Ert opin og hevur lætt við at samskifta.
- Dugir føroyskt, enskt og norðurlendskt mál.
- Ert framfýsin og ágrýtin.
- Dugir at arbeiða undir trýsti.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi innan 19. juni 2006

## Starvsfólk til bókhaldið

Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving og royndir, góðan bókhalds- og teldukunnleika og hava áhuga fyri bókhaldsarbeiði.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi innan 19. juni 2006

## Næmingur til ferðaskrivstovuna í Tórshavn

Vit leita eftir einum næmingi til ferðaskrivstovuna í Tórshavn at byrja sum skjótast.

Vit ynskja, at tú hevur miðnámsútbúgving ella viðkomandi prógv.

Og at tú:
- Ert opin og hevur lætt við at samskifta.
- Dugir føroyskt, enskt og norðurlendskt mál.
- Ert framfýsin og ágrýtin.
- Dugir at arbeiða undir trýsti.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi innan 19. juni 2006

**FLOGFELAG FØROYA**

TEAM85

Nærri fæst av vita um størvini við at venda sær til felagið á tel 340000
Umsóknir skulu sendast til:
**Flogfelag Føroya • Hoydalsvegur 17 • Postboks 3225 • FO-110 Tórshavn**
Att: Uni Danielsen

Í Flogfelag Føroya P/f samtakinum arbeiða í løtuni uml. 60 fólk. Felagið fevnir um: Ferðaskrivstovu í Tórshavn og á flogvøllinum. Kafeteria á flogvøllinum, Hotel Vágar, Rio Bravo, Flogfrakt, avgreiðsla av flogførum, oljuavgreiðslu fyri Statoil á flogvøllinum, Hertz leigubilar og Tax free